| TÓRSHAVNAR BÝRÁÐ<br>21. september 2006 | Blað nr.: **6682**<br>Formansins merki: |
|---|---|

# GERÐABÓK

**Dato:** **21. september 2006**
**Stað:** **Býráðssalurin**
**Málsnr:** **135/06-161/06**

**FUNDARLEIÐARI:**
**Heðin Mortensen**

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Leivur Hansen
Hildur Eyðunsdóttir
Marin Katrina Frýdal
Katrin Dahl Jakobsen
Elin Lindenskov
Annika Olsen
Bjarti Mohr
Beate L. Samuelsen
Sjúrður Olsen
Høgni Mikkelsen
Inga Dahl
Heðin Mortensen

**LUTTÓK IKKI:**
Jan Christiansen, ið hevði boðað frá, at honum barst frá at luttaka.

**LUTTÓK EISINI:**
Bjørgfríð Ludvig
Ingibjørg Berg
Jákup Egholm

**SKRIVARI:**
Jens M. Poulsen

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# MÁL FYRI OPNUM HURÐUM, kl. 18.00:

**Býráðsformaðurin setti fundin og las upp dagsskránna.**

**136/06** **2006-0445**

**Jan Christiansen hevur boðað frá, at honum berst frá at røkja starv sítt sum býráðslimur í meira enn samfullar 14 dagar.**

Sambært § 18, stk. 3, í kommunulógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Inga Dahl, eru loknar.

**Býráðið 21. september 2006:** Samtykt.

**137/06** **2006-0221**

**Mál beind í nevndir.**

**Býráðið 21. september 2006:** Tikið til eftirtektar.

**138/06** **2005-3081**

**Ítróttarhøll á Argjum.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Fólkatalið á Argjum er nógv vaksið tey seinnu árini, og nýggjar útstykkingar verða gjørdar, so tørvur er á eini ítróttarhøll á Argjum.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at heita á byggi- og býarskipanarnevndina um at útvega lendi til ítróttarhøllina.

**Mentamálanevndin 30. november 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býarskipan hevur gjørt uppskot til staðseting av ítróttarhøll vestan fyri verandi fótbóltsvøll á Argjum j. nr. 2005-3081-2.

Uppskotið hevur við sær, at byggisamtyktin fyri økið skal broytast vísandi til, at lendið í dag liggur partvís sum 4. grundumráði.

Fyri at kunna nýta lendið til at byggja ítróttarhøll er neyðugt broyta økið til D2, ið er ætlað ítróttar- og frítíðarvirksemi.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við staðsetingini og samtykkir víðari at mæla býráðnum at taka undir við at broyta byggisamtyktina fyri økið sambært kortskjal, dagfest 06.03.2006.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mars 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. mars 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla broytingina av byggisamtyktini var 10. juli 2006.

Eitt mótmæli er móttikið.

Hetta er frá Poul Müller, bónda, og var handað í sambandi við ein fund tann 4. mai 2006, sum hann hevði biðið um at fáa við formannin í byggi- og býarskipanarnevndini.

Í mótmælinum verður víst til ætlanina um bygging av ítróttarhøll og framtíðarætlaninar frá heildarætlanini um at víðka Argir vestureftir.

Í høvuðsheitum snýr mótmæli seg um, at kommunan ætlar at brúka veltan bøð til at byggja á.

Hann vísir á, at hetta er fóðurgrundarlagið til hansara mjólkineyt, og at alt dyrkilendið, ið hoyrir til festi, er velt.

Eisini vísir hann á, at sbr. Løgtingslóg um landsjørð frá 17 mai 2004, stendur í grein 10, at øki, ið búnaðarstovan selur av landsjørð at byggja á, skal fyrst og fremst umfatað ódyrkaða jørð.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at kommunan heldur fast um at broyta byggisamtyktina fyri økið, vísandi til býarskipanararbeiðið grundað á heildarætlanina samtykt í býráðnum, og vísandi til tað skilagóða í at byggja ítróttarbygging, sum vil stuðla undir verandi ítróttarvirksemið í økinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Samtykt at taka undir við býararkitektinum og beina málið í býráðið.

**Býráðið 21. september 2006:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Elin Lindenskov, Annika Olsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen, Bjarti Mohr og Inga Dahl.

Ímóti atkvøddi: Beate L. Samuelsen.

**139/06** <u>2005-2207</u>

<u>Uppskot til broyting av byggisamtyktini í Nólsoy</u>.

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Bygdin í Nólsoy er staðsett norðan fyri Eiðið. Bygdin liggur sum tøtt bygd á eini suðurskránandi síðu við góðum útsýni yvir bygdina, Havnina og havið.

Henda staðseting við bústøðum ovarliga í bygdini og havnini við felagsøkjum og almennum funktiónum miðskeiðis í bygdini metir umsitingin verða eina stóra styrki fyri bygdina. Hesa staðseting eigur man at halda fast við og styrkja í eini framtíðar skipan av bygdini. Umsitingin hevur mett tað verið rættast ikki at arbeiða við økinum sunnan fyri Eiðið.

Verandi samanseting av bústøðum í Nólsoyar bygd við stórum og smáum eindum, verður í løtuni brúkt til bæði heilársbústaðir og summarhúsbústaðir. Henda samanseting ger, at bygdin er sera fleksibul í nýtslu og kann lofta ymiskum bústaðartørvum í styttri og longri tíðarskeið. Ein framtíðar øking av bústaðum í bygdini skal framhaldandi virka fyri at henda samanseting verður varðveitt.

Umsitingin vísir við kortskjali á framtíðar bústaðarøki, tjaldingar-/ferðavinnuøki og alment fríøki, ið skal økja um samlaðu heildina í bygdini, við ynskjum um at varðveita verandi samanseting í bygdini. Við atliti til vegatgongd, kloakkskipan, vatnleiðing o.a. verða hesar útbygdar samsvarandi.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at byggisamtyktin fyri Nólsoy verður broytt sambært kortskjali.

**Nólsoyarnevndin 14. februar 2006:** Samtykt at mæla til at taka undir við býararkitektinum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mars 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðið 30. mars 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at mótmæla broytingunum av byggisamtyktini í Nólsoy var 10. juli 2006.

Fimm mótmælir eru móttikin.

Eitt mótmæli er frá Jóhannis Paula Danielsen, í Lon, Nólsoy, sum er eigari av matr. nr. 13, vestan fyri bygdina í Nólsoy.

Hann mælir ímóti, at bøur hansara verður tikin til byggilendi, tí at hann hevur brúk fyri honum.

*Til hetta er at siga, at ognin ikki verður tikin til byggilendi, men ætlanin er at broyta byggisamtyktina fyri økið, soleiðis at møguleiki er at byggja har. Um eigarin ynskir at varðveita ognina til hoyggj, hevur hann møguleika til hetta.*

Tvey mótmæli eru einsljóðandi. Tað eina er frá Aimy Djurhuus, Heygsvegur 54, Tórshavn, og Hans Carli Jacobsen, Heiðatún 11, Argir, hitt er frá Juliu Dahl, Villumsgøta 10, Tórshavn, sum øll eru parteigarar av matr. nr. 16, eystan fyri bygdina Nólsoy.

Tey boða frá, at tey ynskja hvør sítt grundstykki fyri mista ogn.

*Til hetta er at siga, at ætlanin er at broyta ognina til byggilendi og ikki at ognartaka hana. Tey hava møguleika til at útstykkja ognina og harvið fáa hvør sítt grundstykki.*

Eitt mótmæli er frá Nikolaj Falck, formanni í byrsufelagnum ”Stilli” í Nólsoy.

Byrsufelagið hevur sítt virksemi eysturi á Nøvuni, tætt við ætlaða økið til tjalding/ferðavinnu. Teir vilja tryggja sær, at virksemið hjá felagnum ikki verður nerva av møguligum broytingum í byggisamtyktini.

Eitt mótmæli er frá Aksel Joensen, sum er uppsitari av matr.nr. 103, eystan fyri bygdina, har ætlanin er at hava økið til tjalding/ferðavinnu.

Hann hevur júst yvirtikið økið, sum er kongsjørð, og hevur ætlanir um at hava seyð og møguliga onnur djór við og sostatt fáa eina rímiliga inntøku av hesum. Í hesum sambandi hevur hann brúkt kr. 120.000,00. Hann umtalar eisini møguleikan fyri at man kemur ásamt um útleigan av einum parti av økinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin heldur fast við ætlaðu broytingarnar í byggisamtyktini grundað á, at tað eru politisk og lokal ynskir um at víðka um byggiøkið og at fáa økið til tjalding/ferðavinnu, og at umsitingin metir, at tað er rættast at leggja nýggju økini uppat verandi bygging fyri m.a. at gera brúk av verandi leiðingum v.m.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Nólsoyarnevndin 19. september 2006:** Nevndin tekur undir við býararkitektinum.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**140/06** **1999-0606**

**Skipanarætlan fyri rennibreytina**.

**Lýsing av málinum, samandráttur.**
Býarskipanardeildin hevur, vísandi til mentamálanevndarsamtyktina dagfest 24. juni 2003, og samtyktina í byggi-og býarskipannevndini j. nr. 9902090-1, gjørt skipanarætlan fyri økið á Hálsi har ein rennibreyt er staðsett.

Uppskotið skipar økið við einari rennibreyt við 8 geirum og einum fótbóltsvølli inni í miðjuni.

Øki er lagt av til parkering og møguligar bygging til virksemið.

Skipanarætlanin leggur upp til at ásetingarnar fyri fyri økið skulu broytast frá at vera C2 - opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki fyri tað økið har rennibreyting liggur.

Ætlanin hevur eisini við sær, at onnur vegatgongd skal finnast til matr.nr. 1394 – sethús og grundstykki og matr.nr. 1408 b og 1408 c – ogn hjá Føroya Tele (dagstovnurin KURLAN).

Ein slík rennibreyt við einum fótbóltsvølli í miðjuni hevði verið eitt skilagott uppískoyti til Gundadal og á Hálsi sum ítrottarøkið.

Hjálagt er uppskot til skipanarætlan j. nr. 200202698-4

**Tilmæli:**
Deildarleiðarin í mentamálum mælir til at arbeitt verður víðari við málinum, og at ein byggiskrá verður gjørd fyri verkætlanina.

**Mentamálanevndin 21. apríl 2004:** Samtykt at arbeiðssetningurin verður soljóðandi:

**Arbeiðssetningur**
Arbeiðsbólkur verður settur at gera eina byggiskrá til ger av rennubreyt við tilhoyrandi økjum og útgerð í Tórshavnar kommunu.

**Byggiskráin skal m.a. innihalda:**

- Skipanarætlan fyri økið á Hálsi, sambært j. nr. 9902090-1, sum plandeildin hevur gjørt, herundir:
  - Stødd, plasering o.a.
  - Uttanduraøki
  - Hølisskrá
  - Atkomuviðurskifti
  - Útbyggingarmøguleikar
- Ognarviðurskifti
- Tíðarætlan
- Leiðbeinandi kostnaðarmeting, býtt sundir í:
  - Undirlendisarbeiðið
  - Breyt við 8 geirum
  - Miðøki við einum fótbóltsvølli
  - Uttanumøki, atkoma, parkering og møguligar bygging til ymiskt virksemið, t.d. gistingarhús.
  - Møguliga atkoma til verandi stadionøki

Bólkurin eigur eisini at hava fyrilit fyri myndugleikakrøvum og øðrum viðurskiftum, soleiðis at hesi verða lýst, nevnast kann m.a.:

at byggisamtyktini skal broytast frá at vera C2 – opin miðstaðarbygging til at verða D2 ítróttarøki.
at kommunan má ogna sær uml. 4000 m$^2$ frá matr.nr. 1393.
at vegatgongd til grannaognir skulu fáast upp á pláss.

Byggiskráin skal leggjast fyri mentamálanevndina í seinasta lagi 30. juni 2004.

Eisini samtykt at arbeiðsbólkurin hevur 3 limir:

1 umboð fyri Trivnaðarfyrisitingina, sum verður formaður
1 umboð fyri Teknisku fyrisitingina og
1 umboð fyri Sersamband fyri frælsan ítrótt

og at játta kr. 200.000 av konto 64 til byggiskránna.

**Mentamálanevndin 30. juni 2004:** Málið varð lagt fram og verður arbeitt víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur eftir summarfrítíðina.

**Mentamálanevndin 7. september 2004:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Avgerandi fortreyt fyri at økið kann brúkast til rennibreyt, er at broyting verður gjørd í byggisamtyktini, har økið verður broytt frá C2-opin miðstaðarbygging til at verða D2, ítróttarøki.

Serstøk byggisamtykt er fyri lítlan part av økinum, sum er kannaður traðarbrúki og velt lendi. Men við atliti til, at talan er um so lítlan part av verkætlanini sum verður umfataður av hesum, og vísandi til at aðrir vegir eru lagdir í økinum undir somu ásetingum, metir býararkitekturin ikki at hetta kann hava við sær at neyðugt verður at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Tilmæli:**
Vísandi til samtykt 22. mars 2004, tá byggi- og býarskipanarnevndin góðkendi skipanarætlan fyri økið, soleiðis at arbeiðast kundi víðari við málinum at leggja fyri nevndina aftur. Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur undir við ætlanini, so at farast kann undir at broyta byggisamtyktina fyri økið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. juni 2005:** Samtykt at taka undir við ætlanini, og at mæla býráðnum til at broyta byggisamtyktina sambært kortskjali 1999-0606/32, dagfest 13. juni 2005, frá C2 øki til D2 øki.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at góðkenna byggiskránna, dagfest 14. juni 2005, og at játta peningin, kr. 700.000,00, ið er tøkur á konto 64, til projektering

**Mentamálanevndin 14. juni 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, og beina málið í býráðið, um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 15. juni 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og mentamálanevndini.

**Býráðið 23. juni 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at bjóða arbeiðið út.

**Mentamálanevndin 8. mars 2006:** Býararkitekturin greiddi frá málinum, sum verður viðgjørt á einum seinni fundi í mentamálanevndini.

**Mentamálanevndin 4. apríl 2006:** Útsett.

**Ískoyti:**
Bygginevndin hevur kannað møguleikar fyri endaliga staðseting og skipan av rennibreytini og vil grunda á lýsinda tilfar, ið er fingið tilvega, mæla til, at farið verður undir at gera eina rennibreyt á Hálsi. Sí kortskjal nr. 19990606 dagfest. 19.05.2006.

Hjálagt er eisini kostnaðarmeting uppá verkætlanina og verður heitt á býráðið, umvegis fíggjarnevndina, at útvega neyðuga pening til verkætlanina.

Vísandi til avgerð í bygginenvndini um skipan av arbeiðinum, mælir nevndin víðari til, at tikið verður av innkomna undirhondsboð uppá arbeiðið at grava oman av á økinum. Hjálagt eru tvey innkomin undirhondsboð.

Vísandi til mannagongd fyri bygging/verkætlanir í Tórshavnar kommunu, mælir bygginevndin víðari til at senda málið til ummælis í hinum faknevndunum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Tvey tilboð eru innkomin:

Karl Patursson kr. 1.189.050,00
Robert Brockiekr. 1.565.483,00

Mentamálanevndin samtykti at mæla býráðnum, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring við Karl Patursson kr. 1.189.050,00.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 31. mai 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Ískoyti:**
Støðuplanur av verkætlanini hevur verið viðgjørdur í teknisku umsitingini.

Eftir sum einki ítøkiligt tekniskt projekt fyriliggur í løtuni, verður greitt frá verkætlanini og hvørji atlit eiga at verða tikin í sambandi við ymsum tekniskum viðurskiftum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at arbeitt verður víðari við projektering av verkætlanini.

**Tekniska nevnd 1. juni 2006:** Nevndin mælir til, at verkætlanin eisini fevnir um betri atkomuviðurskifti frá Sundsvegnum og eina tryggari gonguleið til Gundadalsøkið umframt tekniskar veitingar so sum kloakk, vatn, ljós o.a. at leggja fyri nevndina aftur.

**Býráðið 8. juni 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeitt hevur síðani verið við at kanna ymisk viðurskiftir í økinum, sum liður í endalig projektering. Hesar kanningarnar eru gjørdar í tøttum samstarvi við teknisku fyrisiting – tekniska deild og heilsu- og umhvørvisdeildir hjá TK og landinum, og hava hesar kanningarnar ført við sær, at ávíst neyvari kanningargreystur er neyðugur og kann hava við sær broytt arbeiðslag enn upprunaliga ætlað.

**Tilmæli frá ráðgeva:**

*Viðv.: Rennibreyt á Hálsi.*

*Í samband við grevsturin av leysa áskotinum fram við Norðara Ringveg er gjørdur ein royndargrevstur í helluni, sum ætlanin var at spreingja seinni. Grevsturin er gjørdur við tí á staðnum verandi maskinu. Hellan er rættiliga stabbakend, og tað ber til at "grava" hana. Tilfarið, sum kemur frá maskinuni, sær út sum knúst tilfar, ið er sera væl hóskað til planering av m.a. veg- og parkeringsøkinum. Hetta opnar fyri møguleikanum at gera vegin oman til Kurlu við endaligari umlegging av instalatiónum, eins og at seta lyktafundamentir, kantsteinar í ytra borði og fáa skráan móti ringvegnum og Sundsvegnum lidnan í verandi arbeiðstøku. Í hesum umfari verður eisini nýggja parkeringsøkið við Kurlu gjørt.*

*Arbeiðið við grevstri á økinum, har gamli verkstaðurin hjá Tórshavnar kommunu stóð, er í løtuni lagt stilt orsaka av manglandi plássi í Húsahaga. Um farið verður undir omanfyri nevndu ætlan, kann hetta arbeiði fremjast, meðan TK greiðir viðurskiftini í Húsahaga, og harvið kann arbeiðið sum heild ganga víðari. Verður hendan ætlan framd, er næst komandi arbeiðsveiting eitt greitt definerað øki uttan fyribilsloysnir.*

*Parkeringsøkið, sum skal gerast á verandi ruskøki, verður planerað í staðin fyri at leggja grót í rúgvu. Hetta verður uttan gjald, tí tað er líka lætt at gera planeringina sum at leggja grót í rúgvu. Atkoman til Kurlu verður sum hon er í løtuni, til hon verður broytt til endaliga atkomu. Við hesi loysn verður soleiðis ikki neyðugt at gera fyribils atkomu tvørtur um ognina hjá Shell. Koyringin eftir ognini hjá Føroya Termovirki verður bert nýtt í sambandi við atkomu til vegin Undir Svartafossi. Vegurin frá gamla Sundsvegnum til ognina hjá Jóa og Randi Ziska, sum liggur á tyrving, kann eisini takast burtur í hesi arbeiðsgongd.*

*Sambært avtalu hava vit gjørt eina skitsuætlan fyri arbeiðsgongdina og tilhoyrandi tilboðslista fyri hesa arbeiðsveiting.*

*Maskinkoyring hevur givið hjálagda tilboð, dagfest 29.08.2006, uppá hesa arbeiðsveiting, áljóðandi kr. 2.101.300,00 uttan mvg, og arbeiðið kann fremjast uppá 12 vikur. Um tað gerst neyðugt at brekka í støðum, verður einki eykagjald í hesum sambandi.*

*Vit hava kannað kostnaðin og vilja mæla ti, at tikið verður við tilboðnum. Er áhugi fyri hesi ætlan, vil Verkfrøðingastovan beinanvegin broyta projektið í samsvar við broyttu fortreytirnar.*

Bygginevndin er á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at taka av tilboðnum frá Maskinkoyring áljóðandi 2.101.300,00 kr. uttan mvg.

Víðari í málinum er TK í tí støðu at umhugsast skal, um ikki tað kann loysa seg at taka støðu til niðanfyristandandi tilmæli frá Verkfrøðingarstovuni grundað á trupulleikunum, sum standast av, at tyrvingarplássið í Villingardali, ikki sum er, er ført fyri at taka ímóti tilfar til tyrving.

*Vísandi til avtalu á fundi við bygginevndina 31.08.2006 hevur Verkfrøðingastovan 01.09.2006 sett fyrispurning til Heilsufrøðisligu Starvsstovuna um loyvi til at tyrva meginpartin av tilfarinum á staðnum í staðin fyri sum ætlað í Húsahaga.*

*Heilsufrøðisligu Starvsstovunan hevur við viðhefta skrivi, dagfest 07.09.2006, góðkent ætlanina við ávísum treytum.*

*Grundað á at loyvi er fingið til eina loysn, har tilfarið frá gamla ruskplássinum við serligari fyriskipan verður lagt út sum fylla undir rennibreytini, verður heitt á Tórshavnar kommunu um at geva Verkfrøðingastovuni heimild til at fara undir samráðingar við Maskingrevstur um í minsta lagi at gera neyðuga arbeiði við avgrevstri v.m. á matr. nr. 1395, soleiðis at tann ígongdverandi arbeiðstøkan, sum er steðgað, kann halda áfram, og øskan v.m.,. sum liggur á matr. nr. 1395, og sum fylla í vegnum Undir Svartafossi verður innbygd undir vøllinum.*

*Sum trýstið er á arbeiðsmarknaðinum í løtuni, meta vit tað rætt sum skjótast at gera avtalu við Maskinkoyring um framhaldandi arbeiði, tó sjálvsagt treytað av at semja fæst um kostnaðin.*

Bygginevndin er somuleiðis á fundi kunnað um hesa ætlan og hevur einmælt samtykt at taka undir við uppskotinum frá Verkfrøðingarstovuni og mælir tískil býráðnum, umvegis fíggjarnevndina, til at loyva Verkfrøðingarstovuni at innheinta eitt slíkt tilboð.

Býararkitekturin og ráðgevin koma á fund at greiða frá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um mentamálanevndina, at taka undir við tilmælinum hjá bygginevndini og taka av tilboðnum hjá Maskinkoyring uppá kr. 2.101.300 uttan mvg og at taka upp samráðingar við Maskinkoyring um víðari arbeiðstøku.

**Mentamálanevndin 20. september 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við fíggjarnevndarsamtyktini 13. september 2006.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**141/06** **<u>1999-0345</u>**

**<u>Høllin á Hálsi</u>**

Á fundi í býráðnum 23. september 2004 varð m.a. samtykt at gera eina byggitekniska meting av høllini.

Byggideildin hevur havt samstarv við BBP Arkitektar A/S um at útbyggja og umvæla høllina. Byggideildin hevur á fundi í býráðnum 30. mars 2006 kunnað um ætlaðu umbyggingina av Ítróttarhøllini á Hálsi.

Í uppskotinum er ein kostnaðarætlan og ein tíðarætlan.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at fara undir at gera hesa verkætlanina so skjótt sum til ber. Tað kann ikki metast ráðiligt at halda fram við at lappa uppá verandi høll. Ei heldur má tað metast ráðiligt at fara undir at umvæla høllina bert fyri at fáa hana í brúkiligan stand tó uttan at tillaga hana til øktan tørv og krøv til nýtslu.

Høllin á Hálsi hevur altíð staðið sum ímyndin av føroyskum innanduraítrótti, harumframt at vera stoltleikin fyri samkomu- og ítróttarvirksemi í Tórshavn. Hetta eigur Tórshavnar kommuna, sum landsins høvuðsstaður at leggja seg eftir at kunna siga um Høllina á Hálsi framyvir.

**Tilmæli:**
Mentamálaleiðarin mælir mentamálanevndini til at taka undir við tilráðingini frá býararkitektinum.

**Mentamálanevndin 24. mai 2006:** Nevndin var á staðnum og var víst runt í høllini.

**Uppískoyti/tilmæli:**
Høllin, ið er yvirtikin av Tórshavnar kommunu fyrst í 2005, er niðurslitin, og tørvar átrokandi ábøtur. Fyri at fáa sum mest burtur úr eini so umfatandi umvæling, hava vit mett rættast eisini at hava við í hesum arbeiði eina dagføring av høllini, ið alt annað enn líkur krøvini, ið eru til eina tílíka høll í dag. Tí fyriliggur eitt skitsuuppskot, sum tekur støði í hesum. Atlit eru eisini tikin til, at hon framhaldandi, eftir at arbeiðið er gjørt, fer at verða "høllin" í Føroyum. Býararkitekturin hevur sagt um skitsuuppskotið, at hetta er eitt av teimum betru.

Í skitsuuppskotinum er samantvinna umbygging, uppíbygging og umvæling. Sambært kostnaðarmetingini hjá BBP-arkitektum kostar arbeiðið kr. 32.850.000 (danskir prísir, primo 2006)

Afturat hesum kemur projekterings- og ráðgevaraútreiðslur, kr. 3.942.000 (12% av 32 mill kr.).

Av tí at uppskotið ikki bert inniheldur viðlíkahald, men eisini uppíbygging v.m., halda vit tað er rætt eisini at býta samlaða metingina upp í tveir partar. Annar er umvælingarparturin og hin er uppí- og umbyggingar parturin.

Út frá kostnaðarmetingini kemur fram, at kostnaðurin fyri alt arbeiðið er í “føroyskum kr” 37.777.500 mill. kr. Deila vit hetta upp í áður umtalaðu partar, fáa vit hesa uppdeiling:

| | | |
|---|---|---|
| Umvæling | kr. | 21.903.095 |
| Uppí- og umbygging | - | 15.874.405 |
| Samlað | kr. | 37.777.500 |

Í fjør játtaði býráðið 2,5 mill. kr. á konto 82 til Høllina á Hálsi at gera umvælingar fyri í 2006.

Býararkitekturin mælir til at tikið verður av øðrum av niðanfyri standandi tilmælum. Bæði ganga uppá at fáa sett projekteringsarbeiði í gongd nú.

Í tí fyrra tilmælinum verður mælt til, at arbeiðið verður gjørt út í eitt. Hetta hevur við sær, at eingin kann brúka høllina í byggitíðini, sum ætlandi verður liðug í september 2008.

Tað seinra mælir til, at arbeiðini verða gjørt í 4 byggistigum, soleiðis at yvir eitt rímiligt tíðarskeið stendur høllin liðug, sum skitsuuppskotið leggur upp til.

**1. tilmæli**

at projekteringin av skitsuuppskotinum verður gjørt av BBP-arkitektum, sum hava tillagað eina nýggja tíðarætlan. Teir kunnu byrja uppá projekteringina miðjan august í ár og hava hana lidna miðjan mai 2007. Arbeiðið kann byrja fyrst i juli 2007 og halda fram, til tað er liðugt, áðrenn hondbóltskappingin byrjar aftur í september 2008.

at játtanin til konto 82 verður hækkað við teim knapt 22 mill. kr., og tær írestandi knapt 16 mill. kr. sum íløga ella tiknar sum lán. Projekteringskostnaðurin verður goldin av teim 2,5 mill. kr., sum eru á konto 82, og tær írestandi 1,4 mill. kr. verða deildar soleiðis, at 1 mill. fer til konto 82 og 0,4 mill. kr. sum íløga ella lán. Sett upp í skema sær tað soleiðis út yvir 2 fíggjarár:

| | | |
|---|---|---|
| Hækka játtaninna til konto 82 | kr. | 21.903.095 |
| Partur av projekterings og ráðgeving | - | 1.000.000 |
| Samlað hækking til konto 82 | kr. | 22.903.095 |

| | | |
|---|---|---|
| Játtan til íløgu ella at upptaka lán | kr | 15.874.405 |
| Partur av projektering og ráðgeving | - | 442.000 |
| Samlað íløga ella lántøka | kr. | 16.316.405 |

Hækkan av játtan til konto 82 og játtan til íløgu ella lántøka verða gjørd yvir eitt tvey ára skeið, so hvørt sum tørvur er á peningi.

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2007 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 12.000.000 |
| Og íløga ella lántøka verða gjørd fyri fíggjarárið 2007 við | kr. | 8.000.000 |

| | | |
|---|---|---|
| Fyri fíggjarárið 2008 verður játtanin til konto 82 hækka við | kr. | 11.000.000 |
| Og íløgan ella lántøka verður gjørd fyri fíggjarárið 2008 við | kr. | 9.000.000 |




Omanfyri sæst tíðaraksin fyri projektering og byggitíðina, um arbeiðið verður gjørt út í eitt.

**2. tillmæli**

Í øðrum lagið verður mælt til at projektið verður gjørt liðugt, soleiðis at partar av arbeiðnum kunnu longu byrja í 2007. Arbeiðið kann tá leggjast soleiðis tilrættis, at tað verður boðið út í størri og minni bitum alt eftir tí, sum er best byggitekniskt, og sum pengar verða settir av til.

at peningur verður settur av soleiðis, at projekteringin kann gerast liðug av BBP-arkitektum miðskeiðis í apríl 2007. Hetta fyri at umvælingararbeiðið kann gerast við støði í tí lidna projektinum, soleiðis at arbeiðið verður gjørt í størri og smærri bitum.

at peningur verður settur av til at gera 1. byggistig í fyrstu atløgu, sum umfatar rúmini á eystursíðuna fyrst. Hetta inniheldur at skifta takið, hækka gólvið á hædd við vallargólvið, umvæla og broyta skiftirúmini, wc rúmini og harvið

eisini gera kloakkina á nýggjum og asfaltera gongubreytuna. Framsíðan skal gerast eftir tí nýggja uppskotinum, tvs. skifta klædningin út og skifta og broyta vindeyguni og úthurðarnar. Seta nýggja takrennu og rennustokk upp. Hesi arbeiði kunnu gerast við at hækka játtanina til konto 82 við 9 mill. kr. til fíggjarárið 2007.

Ein møgulig langtíðar ætlan kundi verið hendan.

**1. byggistig**
Umvæling og broyting av hølum, ið liggja úti við eystur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar. Takið skal eisini skiftast.

**2. byggistig**
Útbyggja endan norðureftir, við øllum.

**3. byggistig**
Útbyggja endan suður eftir við øllum.

**4. byggistig**
Taka niður áskoðarabeinkirnar og flyta vøllin inn í mittuna. Gera nýggj áskoðarapláss og umskapa rúmini, sum liggja út til vestur síðuna. Broyting av hesi framsíðu umfatar eisini vindeygu, úthurðar, takrennu og rennustokkar.

**Mentamálanevndin 13. juni 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at 2,5 mió. kr., sum eru játtaðar til umvælingar av høllini 2006, verða nýttar til projektering av umvæling og umbygging, sambært uppskoti frá BBP Arkitektar A/S, februar 2006.

Eisini samtykt at viðgera málið aftur í mentamálanevndini eftir summarfrítíðina.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Trivnaðarstjórin og leiðarin á mentamáladeildini vóru á fundinum og greiddu frá.

Tikið av skrá.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

142/06 **2006-1932**

**Umsókn frá Berg-hestum, dagfest 8. juni 2006, um at leingja leigusáttmálan uppá matr. nr. 1160f í Flatnahaganum.**

Biðið verður um at leingja sáttmálan upp í 20 ár frá 2006 at rokna.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Samtykt at kanna, um leigumálið er ella verður forðing fyri framtíðar vegalinju.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at leingja sáttmálan til 20 ár.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

143/06 **2000-3032**

**Søla av Randarhúsum í Hoyvíkshaganum Suður, t.e. grundstykki, betongarbeiði og projekt, og at kommunan ognar sær sokklarnar nr. 21 og 22 til gonguleið frá Karlamagnusarbreyt til kommunala sambindingarvegin.**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin vísa á tann møguleika, at samtakið fær arbeiðið at gera jørð, kloakk og betongarbeiði klárt til at byggja húsini, og at lonirnar síðani verða latnar byggimeistaranum at byggja og selja.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 2. juni 2003:** Samtykt at kommunan letur gera útbjóðingartilfar av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á, og at biðja samtakið, sum ger útstykkingararbeiðið, um tilboð at leggja fyri nevndina aftur.

Eisini samtykt at heita á fíggjarnevndina um at leggja pening út til projekteringsarbeiðið.

**Fíggjarnevndin 19. juni 2003:** Samtykt at leggja upp til kr. 500.000,00 út fyri projektering.

**Ískoyti:**
Avtala er gjørd við arkitektar 99 um projektering av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini, klárt til at byggja húsini á.

Neyðugt er at gjøgnumganga og projektera eina heila lon fyri at kenna neyðugu fortreytirnar fyri projektering av fundamentsarbeiðnum.

Síðani kann projektið seljast við lonini, tá ið henda verður seld.

Avtalaði kostnaðurin fyri projektering av einari heilari lon og jørð, kloakk og fundamentsarbeiði fyri restina av lonunum er kr. 654.830,00 + mvg, ella kr. 695.757,00 við 6,25% mvg.

Fyri at gjøgnumføra hetta er neyðugt við eini eykajáttan uppá uml. kr. 200.000,00.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2004:** Samtykt at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mars 2004:** Vísandi til at talan er um eina serliga verkætlan, har ein fyritreyt fyri, at ætlanin skal verða væl eydnað, er, at byggingin verður gjørd sambært ætlaða projektinum, og at neyðugt er at projektera eina lon fyri at gera betongarbeiðið liðugt, samtykti nevndin at heita á fíggjarnevndina um at leggja út kr. 200.000,00 afturat til projektering av einari lon, sum umfatar øll húsasniðini.

**Fíggjarnevndin 11. mars 2004:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, treytað av at kommunan eigur projektið og kann nýta hetta til hinar lonirnar uttan meirkostnað.

**Ískoyti:**
Nú er projekteringin av jørð, kloakk og fundamentarbeiðinum til randarhúsini liðug, og eitt samtaki hevur biðið um at sleppa at geva eitt tilboð upp á arbeiðið sambært samtykt hjá byggi- og býarskipanarnevndini 2. juni 2003.

Tilboðið var lagt fyri byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. september 2004:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodna útbjóðing til Byggitek, Articon, Guttesen & Staksberg, J&K Petersen og MT Højgaard.

**Ískoyti:**
Lisitatión var mánadagin 27. september 2004, og komu 4 tilboð inn, MT Højgaard bjóðaðu ikki.

Ráðgevararnir, Arkitektarinir 99, hava gjøgnumgingið øll tilboðini og mæla til at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevði lægsta tilboðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla nevndini til at taka undir við ráðgevarunum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til, um fíggjarnevndina, at taka av tilboðnum frá ARTICON, sum hevur lægsta boð, og at fíggjarlig uppseting fyriliggur til fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 7. oktober 2004:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og at leggja út upp til tkr. 7.000 afturat fyri bygging, ráðgeving, eftirlit og meirvirðisgjald.

**Býráðið 21. oktober 2004:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Arbeiðið at gera jørð, kloakk og sokklar til randarhúsini í Hoyvíkshaganum Suður er væntandi liðugt ultimo januar 2006.

Kommunan hevur í hesum sambandi latið gjørt eitt fullfíggjað projekt uppá eina av átta lonum.

Lon 5, sum er liðugtprojekterað, umboðar øll húsasniðini, sum kommunan hevur góðkent í økinum, og eru sokklarnir háttaðir so, at húsasniðini frá Lon 5 verða sett ymiskt saman á hvørja lon sær.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at bjóða allar sokklarnar til randarhúsini samlað til sølu millum áhugaðar entreprenørar/byggisamtøk til kostprís til tann keypara, ið hevur lægsta søluprís at selja víðari.

Neyðugt er, at kommunan tryggjar sær, at teir, ið bjóða, eru førir fyri at fullføra projektið, tí eigur fyrivarni eisini at verða tikið um ikki at taka av nøkrum boði.

Eisini verður mælt til at áseta m.a. hesar sølutreytir:

Keyparin skal binda seg til:

<u>at</u> halda seg til byggisnið sambært projektinum fyri allar lonirnir, tó kunnu smærri tillagingar loyvast í samráð við kommununa,
<u>at</u> gera samlaðu byggingina lidna innan 3 ár,
<u>at</u> tann, sum keypir randarhús, skal vera á bíðilista hjá Tórshavnar kommunu, og
<u>at</u> kommunan kann seta treytir í sambandi við hesa víðarisølu.

**Fíggjarnevndin 26. oktober 2005:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Leivur Hansen, mælir býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og býararkitektinum og at bjóða arbeiðið út í almennum útboði.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Bjarti Mohr, mælir til at selja til hægstbjóðandi og loyva víðarisølu til marknaðarprís.

**Býráðið 3. november 2005:** Atkvøtt varð um tilmælið frá Sjúrði Olsen um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Hildur Eyðunsdóttir, Marin Katrina Frýdal, Katrin Dahl Jakobsen, Halla Samuelsen, Vagnur Johannesen, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Greiddi ikki atkvøðu: Leivur Hansen.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Katrin Dahl Jacobsen og Leivur Hansen, samtykti at taka undir við samtyktini hjá meirilutanum í fíggjarnevndini 26. oktober 2005.

Ein minniluti, Sjúrður Olsen og Bjarti Mohr, mælir til at selja sokklarnar fyri kostprís hvør sær ella saman til smærri entreprenørar í býnum og síðani at selja húsini aftur í fríari sølu.

**Býráðið 24. november 2005:** Fyrst var atkvøtt um tilmælið hjá minnilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, sum fall við 6 atkvøðum fyri og 7 ímóti.

Fyri atkvøddu Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

Ímóti atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin K. Frýdal, Katrin D. Jacobsen og Halla Samuelsen.

Síðani var atkvøtt um tilmælið hjá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, sum var samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 ímóti.

Fyri atkvøddu atkvøddu Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Leivur Hansen, Hildur Eyðunsdóttir, Marin K. Frýdal, Katrin D. Jacobsen og Halla Samuelsen.

Ímóti atkvøddu Inga Dahl, Bjarti Mohr, Beate L. Samuelsen, Sjúrður Olsen, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen.

**Ískoyti:**
Orsakað av veðri og øðrum óvantaðum trupulleikum, er arbeiðið at stoypa sokklarnar nakað seinkað, men er nú um at verða liðugt. So er klárt at bjóða økið út til sølu.

Í grein 4 í ásetingunum fyri A3 øki stendur.:

> *Hús mugu einans verða bygd <u>í einari hædd við nýttum lofti</u> og mugu ikki vera hægri enn <u>5 m til yvirgrind</u> og 9 m til mønuna mált frá meðaljørðildi (meðal við húsahornini). Kjallaraloftið má ikki vera meira enn 1,0 m omanfyri hægsta jørðildi við húsahorn. Er hæddarmunurin á lendi, roknað sum munurin millum hægsta og lægsta jørðildi, minni enn 1,5 er tó loyvt at*

*leggja kjallaraloftið upp til 2,5 m oman fyri lægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.*

*Í heildarætlan ella í serætlan fyri náttúrliga avmarkað øki kann verða loyvt at byggja hægri og fyriskipað at húsini verða sett í veglinju ella byggilinju.*

Samanbygdu húsini eru sambært projektinum í 2 og 3 fullum hæddum og meira enn 5 m til yvirgrind. Tí er neyðugt at býráðið samtykkir projektið sum ein serætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki, sum grein 4 heimilar. Hetta fyri at byggjast kann sambært projektinum.

Í sambandi við útbjóðingina er eisini neyðugt at frámatrikulera lendið, har saman-bygdu húsini skulu standa, frá felagsøkinum.

Umsitingin metir tað verða rættast, at hvørt av samanbygdu húsunum eigur stykkið, har húsini standa á. Harafturat skal hvørt hús eiga 2 ávís parkeringspláss og ein skúr sambært hjáløgdu støðumynd.

Hendan loysnin er umrødd við Matrikulstovuna, sum tekur undir við henni. Matrikulstovan mælir eisini til, at øll samanbygdu húsini verða sundurbýtt, áðrenn bygt verður.

Í sambandi við verkætlanina "Stóratjørn" hava ynski verið um, at hava eina beinleiðis farleið, ið bindur Karlamagnusarbreyt og Stórutjørn saman. Hetta kann merkja, at tvey tey eystastu húsini í lon 5, skulu takast burturúr ætlanini um samanbygdu húsini í Hoyvíkshaganum suður.

Av tí at Karlamagnusarbreyt gongur ígjøgnum eina útstykking, kann ein koyri-vegur, við gjøgnumkoyrandi ferðslu, ikki gerast her, hetta vil broyta fortreytirnar fyri fólki, sum hevur keypt grundøki í Hoyvíkshaganum suður. Tí kann talan bert verða um eina gonguleið ígjøgnum økið.

Um nevndin samtykkir hesa farleiðina, er neyðugt at lýsa ein servitutt á økið, um at hetta er ein gonguleið og ikki ein koyrivegur, har bert eigarafelagið hevur átalurætt. Eisini má kommunan bera kostnaðin av tí arbeiði, sum er gjørt á økinum.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin samtykkir byggiætlanina við samanbygdum húsunum í útstykkingini Hoyvíkshagi suður, sum ein serætlan fyri eitt náttúrliga avmarkað øki sambært projektinum fyri byggingina.

Eisini mælir býararkitekturin til, at samanbygdu húsini verða sundurbýtt sambært hjálagda kortskjali, soleiðis at hvørt hús eigur 2 ávís parkeringspláss og ein skúr.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. apríl 2006:** Samtykt at taka undir við til-mælinum.

Síðani samtykti nevndin at heita á býráðið, at kommunan ognar sær sokklarnar nr 21 og 22 v.m. til gonguleið frá Karlamagnusarbreyt til kommunala sambindingar-vegin.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini at fíggja av útstykkingarætlanini fyri Hoyvíks-hagan norðan fyri sambindingarvegin.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Seinasta freist at lata tilboð inn um keyp av økinum til samanbygd hús var 6. juni 2006.

Inn komu 2 tilboð.

Eitt frá sp/f S. H. Smíð, v/ Hanusi Olsen, á kr. 82,490 mill. og eitt frá samtakinum J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil á kr. 82,635 mill.

Viðmerkjast skal, at í báðum tilboðum eru nøkur ivamál, eins og onkrar upplýsingar vanta. Skal farast víðari við málinum má hetta kannast fyrst.

Tilboðini lógu rættiliga tætt. Munurin var bert kr. 145.000,00 av einum samlaðum víðarisølukostnaði uppá uml. kr. 82,5 mill.

Ein samlaður víðarisølukostnaður uppá kr. 82,5 mill gevur ein $m^2$ prís uppá kr. uml. 15.000,00. Hetta gevur ein miðal kostnað uppá uml. kr. 2 mill fyri 132 $m^2$ og kr. 1,33 mill fyri 88,5 $m^2$, tó skal man rokna við, at tey smærru húsini kosta lutfalsliga meira enn tey størru.

Kommunan hevur latið ein óheftan ráðgeva gera eina útgreinaða kostnaðarætlan fyri byggingina. Hendan vísir, at tilboðini eru rímilig.

Prísurin, teir privatu byggiharranir, ið byggja íbúðir í TK, vanliga rokna við, er kr. 16.000,00 pr. $m^2$ fyri íbúðir.

Í útboðsskrivinum verður dentur lagdur á, at kommunan ynskir at útvega borgarunum dygdargóðar og bíligar bústaðir.

Í hesum projektinum við samanbygdum húsum í Hoyvíkshaganum suður, er dentur sostatt lagdur á góðsku. Tilfarið, sum húsini eru bygd av, hevur eina høga góðsku, og nógv er eisini arbeitt við útsjóndini á húsunum.

Húsini verða harumframt leverað heilt liðug við dygdagóðum gólvum, køki og hvítvørum og liðugt málað. Uttanfyri hevur hvørt hús ein skúr, 2 parkeringsøki, terassu og partvís liðugt øki til urtagarð.

Sæð út frá hesum, metir býararkitekturin/byggideildin, at kostnaðurin er tann rætti, og at keyparin fær ein kvalitetsbústað fyri kostnaðin.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til, at umsitingin í fyrstu syftu fær heimild at seta seg í samband við tilboðsgevararnar fyri at nágreina innkomnu tilboðini og harvið gera tey meira sambærilig.

Tá hesi viðurskifti eru kannað, vendir umsitingin aftur við endaligum tilmæli.

**Fíggjarnevndin 29. juni 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og býararkitektinum.

**Ískoyti:**
Upphæddirnar í innkomnu tilboðunum vóru sum kunnugt upprunaliga hesar:

Samtakið J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil:
**Kr. 82.635.125,00**

Sp/f S.H. Smíð:
**Kr. 82.490.000,00**

Síðani fíggjarnevndarfundin 29. juni 2006 hevur umsitingin verið í samband við tilboðsgevararnar fyri at nágreina innkomnu tilboðini og gera tey meira sambærilig. Tilboðsgevararnir hava fingið skriv, har teir eru bidnir um at greiða frá ávísum ógreidleikum við tí, ið fevnt var av tilboðnum og tiknum fyrivarnum. Eisini hevur fundur verið við báðar tilboðsgevararnar.

Eftir hetta samskifti hava báðir tilboðsgevararnir skrivliga boðað kommununi frá, hvørjar broytingar í upprunaligu tilboðsupphædd teirra hesar nágreiningar hava elvt til.

Samtakið J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil hevur soleiðis upplýst, at eftir at fyrivarni eru strikað og útgreinað er, hvat er fevnt av uttandura arbeiði/jørðarbeiði teirra, er tilboðsupphæddin óbroytt, t.e. at samtakið bjóðar seg framhaldandi til at gera arbeiðið fyri **kr. 82.635.125,00.**

Sp/f S.H. Smíð hevði í tilboði sínum og í seinni skrivi ikki tikið uttandura arbeiði/jørðarbeiði við, eins og uttandura máling ikki var íroknað. Síðani fundin við umsitingina hevur sp/f S.H. Smíð tí boðað frá, at aftrat tilboðnum frá felagnum skulu leggjast hesar upphæddir:

Málaraarbeiði uttandura:

| | |
|---|---|
| Húsatypa 1 | Kr. 26.850,- |
| Húsatypa 2 | Kr. 34.850,- |
| Húsatypa 3 | Kr. 34.850,- |

| | |
|---|---|
| Húsatypa 4 | Kr. 34.850,- |

Jørðarbeiði aftanfyri húsini:

| | |
|---|---|
| Planering við skervi | Kr. 296.250,- |
| Slætta verandi mold | Kr. 495.000,- |

Samanlagt hevur útgreiningin av tilboðsprísinum frá sp/f S.H. Smíð við sær, at samlaða tilboðsupphæddin hækkar við 2.299.300,00 og fer úr kr. 82.490.000,00 til **kr. 84.793.500,00 -** (talið 84.793.500 er funnið soleðis: 82.490.000 + 495.000 +296.250 + 187.950 (t.e. 7*26.850) + 1.324.300 (t.e. 38* 34.850) = 84.789.300).

Endaligu tilboðini síggja sostatt soleiðis út:

Samtakið J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil:
**Kr. 82.635.125,00.**

Sp/f S.H. Smíð:
**Kr. 84.793.500,00.**

Umsitingin hevur onga orsøk til at finnast at fakliga og fíggjarliga førleikan hjá hvørgum av tilboðsgevarunum at fullføra verkætlanina.

**Tilmæli:**
Havandi í huga endamálið við hesi ætlan, nevniliga at útvega borgarunum dygdargóðar og bíligar bústaðir, mæla kommunustjórin og býararkitekturin til, at býráðið umvegis fíggjarnevndina tekur av lægra tilboðnum, ið er frá Samtakinum J&K Petersen Contractors og Sandavágs Timburhandil. Samstundis fær umsitingin heimild at fara undir samráðingar við samtakið um skeytistreytir, sáttmálatreytir, víðarisølutreytir o.l. og annars at avgreiða søluna.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum og býararkitektinum og at selja ognina, matr.nr. 135fe, Hoyvík, fyri kr. 18.000.000.

**Býráðið 21. september 2006:** Skriv frá sp.f. S. H. Smíð, dagfest 18. september 2006, viðvíkjandi tilboði uppá randarhús í Hoyvíkshaganum Suður, og skriv til borgarstjóran, dagfest 21. september 2006, frá kommunustjóranum vóru framløgd. Hesu skriv vóru eisini framløgd á fíggjarnevndarfundi 21. september 2006.

Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 13. september 2006.

**144/06** **<u>2002-1012</u>**

**<u>Øki til til eina nýggja hondbóltshøll til hondbóltsfelagið Neistan</u>**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umboð fyri Neistan møta á fundinum.

Málið er ikki viðgjørt í umsitingini.

**Mentamálanevndin 12. apríl 2002:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá hondbóltsfelagnum Neistanum, har søkt verður um at sleppa at fáa økið at byggja eina hondbóltshøll á.

Felagið vísir á økið í Marknagili, - matr. nr. 917, ið er ogn hjá TK og liggur, sambært almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, í umráðispartinum D2.

Hjálagt er:

| | |
|---|---|
| Umsókn frá umsøkjaranum: | j. nr. 2002-1012 |
| Kortskjal av økinum: | j. nr. 2002-1012 |

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Umsitingin hevur havt samráðingar við Neistan í sambandi við at teir upprunaliga søktu um at sleppa at byggja høllina á Frælsinum.

Hesum noktaði umsitingin fyri og vísti tá á, at umsitingin arbeiddi við einari ætlan úti í Marknagili, sum teir kundu gerast partur av.

Ætlanin bleiv síðani slept, og hevur umsøkjarin so vent sær aftur til TK við umsókn um at fáa ávíst eitt annað øki.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at lata Neistanum økið, matr. nr. 917, at byggja eina hondbóltshøll á.

Samstundis verður mælt til, at álagt verður Neistanum at skipa soleiðis fyri, at høllin møguliga kann útbyggjast til eina dupulthøll.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 29. september 2003:** Samtykt at taka undir við ætlanini at lata Neistan byggja eina hondbóltshøll á part av matr. nr. 917, og at restina av økinum verður avlagt til eina møguliga høll aftur at.

Eisini samtykt at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 9. oktober 2003:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**2002-1012**
**Umsókn um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917, við Landavegin í Tórshavn.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Hondbóltsfelagið Neistin søkir um byggiloyvi til ítróttarhøll á matr. nr. 917 við Landavegin í Tórshavn.
Útgangsstøðið fyri høllina er at gera eina høll, sum í støðd tekur støði í støddini á einum hondbóltsvølli, sum lýkur altjóða krøv til innandura hondbóltsvallir viðv. hædd, vídd og umstøðum til leikarar dómarar og áskoðarar.

Góðar umstøður verða til tey rørslutarnaði.

Bygningurin kann býtast upp í sjálvan hallarbygningi, og ein síðubygning, sum partvís er í tveimum hæddum. Samlaða víddin á bygninginum verður 2.945,4m².

Tað verða pláss fyri í alt 910 áskoðarum, harav tey 680 verða sitipláss.

Útveggir og tekjan verða klædd við profileraðum aluminiumsplátum. Vindeygu og úthurðar verða úr aluminium.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í umráðisparti D2 ítróttarøki, og er umsóknin viðgjørd eftir almennu byggisamtyktini.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Grundøkið, matr. nr. 917, er 16.843 m² til víddar.
Byggistigið verður 0.17. Mest loyvda byggistig er 0.25.
Nettonýtslustigið verður 0.24. Mest loyda nettonýtslustig er 0.3.
Tal av bilstøðlum fult útbygt 273. Kravt tal av bilstøðlum 4117,4 / 50 = 82.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Fíggjarnevndin hevur samtykt á fundi 15. mars 2006 at játta kr. 7.250.000,- yvir 5 ár.

**Skjøl:**
Umsókn og tekningar, j.nr. 2002-1012.
Støðumynd í mát 1:1000.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir nevndini at ganga umsóknini á møti, at senda málið til grannakunningar, og at útskriva byggiloyvi, tá aðrir myndugleikar, ið hava heimild at seta krøv, hava góðkent byggingina. Samstundis at beina málið í teknisku nevnd, í sambandi við ætlaða vegin fram við vestara markinum, sum skal samanbinda Landavegin og Marknagilsvegin, umframt eitt møguligt bussteðgipláss í sambandi við høllina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Nevndin samtykti at beina málið í fíggjarnevndina til avgreiðslu av lendisspurninginum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at leiga Neistanum hóskandi/neyðugt lendi av matr. nr. 917 til bygging av ítróttarhøll við neyðugum uttanum øki til parkering v.m. við somu treytum og leiguupphædd sum aðrir ítróttarbygningar.

Tilsøgnin um leigu er treytað av, at byggingin er byrjað innan 2 ár.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**145/06** **2005-1122**

**Ábøtur á Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sum partur av støðuga arbeiðnum at halda við líka og bøta um viðurskiftini í miðbýnum og ásannandi, at verandi flísalegging á Niels Finsens gøtu er í ringum standi, hevur umsitingin gjørt uppskot til nýtt snið, tilfar og skipan. J. nr. 2005-1122.

Uppskotið leggur upp til, at ein 1-sporað koyribreyt verður asfaltløgd, endað við trimum røðum av chausses-steinum. Millum koyribreytina og gongubreytina verður skipaður ein geiri, har ljós, beinkir, ruskspannir og skeltir skulu verða. Lagt verður upp til, at flísarnar á gongubreytini verða skiftar til sama slag, sum er á gongubreytunum í miðbýnum annars - betongflísar við chausses-steinum ímillum.

Uppskotið leggur upp til, at gosvatnið á vegamótinum Sverrisgøta/ Niels Finsens gøta verður burturbeint, og tískil skal avgerð takast um, hvørt arbeiðið skal gerast í einum tveimum stigum.

Um so er, at avgjørt verður at gera arbeiðið í stigum, kann 1. partur vera at leggja asfalt, chausses-steinarnar og seta upp nýggjar lampur og beinkir tveimum teinum - av Vaglinum niðan til gosvatnið og frá gosvatninum niðan í Steinatún. Sí kortskjal 1. stig.

2. partur kann so vera at skifta flísarnar á gongubreytunum og at beina gosvatnið burtur. Sí kortskjal 2. stig. nr. 2005-1122.

Ætlanin er at byrja arbeiðið sum skjótast.

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til, at nevndin góðkennir uppskotið og beinir málið í býráðið um teknisku nevnd.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina í samband við at játta kr. 900.000 til endamálið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 6. mai 2005**: Nevndin samtykti at heita á umsitingina at arbeiða víðari við málinum at leggja fyri aftur á næsta fundi.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur gjørt eitt nýtt uppskot. Í staðin fyri asfalt verða brúgvasteinar nýtt sum belegning.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 30. mai 2005:** Samtykt at taka undir við nýggja tilmælinum og at kunna grannarnar í góðari tíð.

**Ískoyti:**
Umsitinging hevur saman við HMP consult gjørt útbjóðingartilfar. Mett verður, at samlaði kostnaðurin verður 1.568.100 kr. íroknað mvg.

Mælt verður til at góðtaka uppskotið og at mæla fíggjarnevndini til at játta pen-ingin umvegis teknisku nevnd.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 20. september 2005:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, tekur undir við uppskotinum og beinir málið í teknisku nevnd.

Somuleiðis samtykti meirilutin at beina málið í fíggjarnevndina í sambandi við fíggjan av konto fríðkan av býnum 2005/2006 og at hava kunnandi fund við grannarnar.

Ein minniluti, Jan Christiansen, mælir til, at kunnandi fundur verður við grannarnar, áðrenn málið verður viðgjørt í fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Umsitingin hevur havt kunnandi fund við grannarnar tann 28. september 2005.

Samtykt at mæla býránum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og játta kr. 1.568.000 av íløgum.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Tekniska nevnd 20. oktober 2005:** Málið framlagt.

**Ískoyti:**
2 virki vóru boðin at geva undirhondsboð uppá álegging av brúgvarsteinum í Niels Finsensgøta, og hevur umsitingin móttikið hesi tilboð:

| | |
|---|---|
| J & K Petersen | 3.633.592 kr. |
| Articon | 1.893.750 kr. |

**Tilmæli.**
Býararkitekturin mælir til at byrja samráðingar við Articon um gerð av arbeiðinum.

**Fíggjarnevndin 7. desember 2005:** Samtykt at taka upp samráðingar við Articon.

**Fíggjarnevndin 15. desember 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka av tilboðnum hjá Articon og at játta kr. 1.600.000,00 av íløgum.

**Býráðið 15. desember 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Tilboðið hjá Articon ljóðaði upp á 1.893.750 kr. uttan mvg, svarandi til 2.012.109 kr. við 6,25% mvg. Játtað var 1.600.000 kr. Til liðugtgerð av arbeiðið vantar solstatt 412.109 kr.

**Tilmæli:**
Býararkitektin mælir til at játta 412.109 kr. til liðugtgerð av belegning á Niels Finsengøtu.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 1. mai 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum, og at peningurin verður nýttur av konto fyri fríðkan av býnum.

**Ískoyti:**
Koyribreytin í Niels Finsensgøtu er nú skift út, og sambært upprunaligu ætlanini verður næsta stig at skifta belegning á gongubreytini og uppseting av nýggjum lampum frá Steinatúni og oman til Gamla Bókhandil. Umsitingin hevur gjørt kostnaðarmeting.

| | |
|---|---|
| Stig 1. Býráðssalurin – Káta Hornið | 348.000 kr. |
| Stig 2. Føroya Banki – Kondittarríið | 290.000 kr. |
| Stig 3. Býráðssalurin – Mylnugøta | 390.000 kr. |
| | |
| Pláss 1. Springvatnið – Ebenezer | 340.000 kr. |
| Pláss 2. Innkoyring við Steinatún | 270.000 kr. |
| | |
| 21 stk. Lampur v. uppseting | 379.500 kr. |

| | |
|---|---|
| Projektering, óvantað og mvg. | 524.550 kr. |
| Samlaði kostnaðin eru mett til | 2.700.928 kr. |

**Tilmæli:**
Býararkitekturin mælir til at nevndin tekur við ætlanini at arbeiða víðari at liðugtgera Niels Finssensgøtu, og at nevndin heitir á býráðið umvegis fíggjarnevndina at játta pening á konto "fríðkan av býnum".

Býararkitektin mælir til at taka undir við uppskotinum og at gera teinar 1,2 og lampur á hesum teinunum til samlaðan kostnað við projektering/eftirlit, óvæntað og mvg upp á tilsamans 1.542.050 kr. Peningurin til hetta arbeiðið skal fíggjast av konto fyri fríðkan av býnum, soleiðis at ætlaðar íløgur á hesari kontoini vera raðfestar á henda hátt:

| **Fríðkan av býnum** | **2005** | **2006** | **2007** |
|---|---|---|---|
| Økið til Müllers pakkhús | 800 | 0 | |
| N. Finsensgøta, ábøtur | 500 | 1.800 | |
| N. Finsensgøta, ábøtur gongubreyt | 0 | 1.200 | 400 |
| Vaglið | 0 | 0 | |
| Tinghúsvegur | 400 | 0 | |
| Tinghúsvegur ognir hjá TK | 200 | | |
| Sverrisgøta/ Dr. Jacobsensgøta, ábøtur | 0 | | |
| Síðuvegir, atkoma, gøtur o.a. | 100 | 300 | |
| Kirkjugarðurin á Svínaryggi | 100 | 200 | |
| Onnur fríðkan | | | |
| Steinatún | | | |
| **Fríðkan av býnum** | **1.900** | **3.700** | |

Hetta merkir, at játtast skulu 1.2 mill. kr. av íløgunum fyri fríðkan av býnum fyri 2006, og at játtast skulu 400 túsind kr. av íløgunum fyri 2007.

Somuleiðis mælir býararkitekturin til, at nevndin tekur undir við at arbeiðast skal eftir uppskotinum um heildarloysn fyri Niels Finsens gøtu frá Vaglinum niðan til Steinatún, soleiðis at málið kann sendast til teknisku nevnd til ummælis.

Til hetta málið var Michael Jacobæus, lendisarkitektur, og greiddi frá.

**Byggi- og býarskipanarnevndin tann 12. juni 2006**: Nevndin samtykti at mæla býráðnum um fíggjarnevndina til at marka 1,2 mió kr. av íløgum í 2006 og 400.000,00 kr. í 2007 til ábøtur á N. Finsensgøtu.

Eisini samtykti nevndin, at umsitingin hevur kunnandi fund við handlarnar fram við gøtuni um ætlaðu heildarloysnina frá Vaglinum niðan til Steinatún.

**Fíggjarnevndin 21. juni 2006:** Ein meiriluti, Jógvan Arge, Leivur Hansen og Heðin Mortensen, mælir býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

Ein minniluti, Høgni Mikkelsen og Jan Christiansen, tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðið 29. juni 2006:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
2 virki eru biðin um at geva undirhondsboð upp á liðugtgerð av gongubreytini í Niels Finsensgøtu, og hevur umsitingin móttikið hesi tilboð:

Sí hjálagt tilboð

**Tilmæli.**
Býararkitekturin mælir til at taka undir við tí lægsta tilboðnum.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. september 2006:** Innkomnu tilboðini vóru: J.& K Petersen kr. 2.2604.637 u/mvg og Articon kr. 1.976.430 u/mvg.

Nevndin samtykti at mæla býráðnum, umvegis fíggjarnevndina til, at taka av lægra tilboðnum frá Articon. Við mvg er kostnaðurin hjá Articon kr. 2.099.000,00. Harumframt koma 10 ljósmastrar fyri tilsamans 120.000,00 kr.

Mælt verður býráðnum at játta kr. 1,2 mió kr av íløgum 2006 og 1 mió av íløgum fyri 2007. Eisini at kunna handilslívið um arbeiðsætlanina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**146/06** **2004-1434**

**Fyrspurningur frá felag um møguleikarnar fyri at fremja eina ætlan um at byggja neyst í einum parti av grótbrotinum norðanfyri SEV-verkið á Sundi.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Umsitingin hevur móttikið skriv frá umsøkjara um at fáa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið) avlagt til p/f Sundsneystini til neystabygging.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 4. juli 2005:** Nevndin samtykti at biðja umsitingina um eina skipanarætlan fyri økið og lýsing av atkomumøguleikunum og at boða umsøkjaranum frá hesum.

**Ískoyti:**
Kommunustjórin hevur um telefonina havt samband við stovnararnar av p.f. Sundsneystunum og eftirlýst

1) umsókn um at keypa lendið norðan fyri Sund (grótbrotið)
2) skipanarætlan fyri økið
3) lýsing av atkomumøguleikunum.

ad 1) Beinleiðis umsókn er ikki send kommununi, men teir vísa til teldubræv frá 30. juni 2005.
ad 2) skipanarætlan er ikki latin kommununi, men teir hava eina ávegis skipanarætlan at lata.
ad 3) Sum ad 2.

Kommunan hevur fyri tíð síðani keypt lendið (grótbrotið), matr. nr. 4c, Sunds bygd, fyri kr. 262.250,05, sbrt. skeyti frá 14. juli 2005 við treytum.

Búnaðarstovan upplýsir, at kommunan herumframt hevur rindað eitt sindur meira fyri lendið, síðani tað var keypt fyri tíð síðani.

Herumframt hevur kommunan rindað fyri tinglestur og matrikulering.

Í sambandi við málsviðgerðina verður víst til umfarskriv, dagfest 27. oktober 1961, frá Føroya landsstýri til Tórshavnar kommunu og øll kommunustýrini.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir býráðnum til um fíggjarnevndina at leiga sp/f Sundsneyst, matr nr. 4c, Sunds bygd, støðd 30.853 ferm., í 40 ár við rætti til framleingjan og fyri vanligan prís sum óbyggibúgvið havnaøki treytað av loyvi landsstýrisins og treytað av, at bygt verður innan 2 ár.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til, í prinsippinum, at leiga s/pf Sundsneystunum økið, matr.nr. 4c, Sundsbygd, støðd 30.853 ferm., til neystabygging og tilhoyrandi virksemi í 50 ár við rætti til framleingjan.

Leigan verður samsvarandi leigu av 3 traðum, t.v.s. kr. 3.000 pr. ár. Fortreyt fyri møguligum leigumáli er, at tílik bygging og virksemi er heimilað í byggisamtyktini fyri økið og at loyvi fæst frá landsstýrinum.

**Býráðið 21. september 2006:** Tikið av skrá.

**147/06** **2005-2292**

**Parkeringsøki á Skarðshjalla til tung akfør**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Byggi- og býaskipanarnevndin samtykti 28. februar 2005 (í máli nr. 2004-1892) at vinnuøkið til last- og bussbilaeigarar verður útvegað á Skarðshjalla og samtykti at mæla býráðnum til at skipa slíkt øki á Skarðshjalla sum alment p-pláss fyri bussar og lastbilar.

**Tekniska nevndin 22. september 2005:** Nevndin samtykti at taka undir við samtyktini í fíggjarnevndini 9. mars 2005, í máli nr. 2004-1892 og at umsitingin letur gera uppskot til alment parkeringspláss og endurskoðaða kunngerð um parkering í Tórshavnar kommunu at leggja fyri teknisku nevnd aftur.

**Ískoyti:**
Víst verður j. nr. 2004-1892 har fíggjarnevndin samtykti 9. mars 2005 at taka undir við hugskotinum um almenna parkering til tunga ferðslu á Skarðshjalla og at leggja málið fyri nevndina aftur við ætlan fyri skipan av økinum og kostnaðarmeting.

**Fíggjarnevndin 28. september 2005:** Samtykt at mæla býráðnum til at kommunan keypir stk. nr. 1 í útstykkingini á Skarðshjalla, sum er 2.350 m² fyri kr. 620 pr. m², íalt kr. 1.457.000, at fíggja av konto 83.

**Býráðið 6. oktober 2005:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur fingið til vega uppskot um innrætting av p-plássi til tunga ferðslu á stk. nr. 1 í útstykkingini á Skarðshjalla. Eisini hevur umsitingin gjørt uppskot til endurskoðaða kunngerð um parkering í Tórshavnar kommunu.

Sambært notati nr. 2005-2292/13 krevur Heilsufrøðiliga starvsstovan umhvørvisgóðkenning av plássinum ella í minsta lagi, at oljuútskiljari verður á staðnum, og eigur málið tí at verða beint í heilsu og umhvørvisnevndina at kanna hesi viðurskifti.

Greitt verður frá uppskotunum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við uppskoti nr. 01, dagf. 28.11.2005, frá sp/f Protek. (j. nr 2005-2292/10) og at beina málið aftur í heilsu- og umhvørvisnevndina at staðfesta neyðug umhvørvisátøk, at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 12. januar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum.

**Ískoyti:**
Sambært løgtingslóg um umhvørvisvernd kemur virksemið undir kap. 5, "Serliga dálkandi virki v.m.". Hesin parturin av virkseminum er í fylgiskjalinum til lógina merkt við eini stjørnu (I.3), og sambært §26, 3. stk., merkir hetta, at virksemið kann vera undantikið skylduna til góðkenning, um mett verður, at tann dálking, ið virkið, fyritøkan ella útbúnaðurin vil kunna elva til, hevur minni týdning fyri umhvørvið. Í minsta lagi verður kravt oljuútskiljari á økinum.

Virksemið á økinum verður 16 p-pláss til lastbilar/bussar við skipaðum vaskiplássi.

Heilsu- og umhvørvisdeildin hevur tann 8. februar 2006 sent Heilsufrøðiligu starvsstovuni skriv við áheitan um, at ein umhvørvismeting av virkseminum verður gjørd.

**Heilsu- og umhvørvisnevndin 16. februar 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum við teimum treytum, sum umsitingin setur.

**Ískoyti:**
Tekniska nevndin samtykti 12. januar 2006 at taka undir við uppskoti nr. 1 og beina málið í heilsu- og umhvørvisnevndina fyri at staðfesta neyðugu umhvørvisátøkini og síðani at leggja málið fyri nevndina aftur. Heilsu- og umhvørvisnevndin hevur á fundi 16. februar 2006 samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

Umsitingin hevur latið gera uppskot at taka støðu til og at leggja fyri fíggjarnevndina.

**Viðv. skjali nr. 2005-2292/18**

Uppskotið innniber regnvatnsleiðingar, oljuútskiljara við tilhoyri, fínplanering, asfaltering og stríping av 16 básum til lastbilar og bussar upp til 12 m longd.

Kostnaðarmetingin, við 10 % til projektering, umframt 6,25 % mvg, er kr. 800.000.
Uppskot B leggur upp til at økið verður nýtt til almenna parkering til lastbilar og bussar, sum kunnu standa á plássinum upp til 4 tímar frá kl. 09-16.
Plássið er ikki innhegnað.
Ljós er ikki annað enn frá elsteyrum fram við vegnum. Kommunan eigur alt viðlíkahald av økinum.
Økið kemur at virka undir parkeringsskipanini.

**Viðv. skjali nr. 2005-2292/19**

Biðið verður um, at tekniska nevnd tekur støðu til uppskot um dagføring av kunngerð um parkering í kommununi.

Víst verður til skjal 2005-2292/12:
Í § 1 verður setningurin '(lastbilar, vøruvognar og bussar)' tikin burtur.
Í § 2 verður setningurin 'sí niðanfyristandandi kort' tikin burtur.

Víst verður eisini til skjal 2005-2292/20:
Støða skal verða tikin til ávísingarnar hjá Finn Ougaard, vpm, viðvíkjandi 'víðkan' av kommununi. Hann setur spurning við, um kommunan hevur umhugsað avleiðingarnar av at lýsa hesa kunngerð, nú kommunan er vorðin so stór. Avleiðingin verður, at neyðugt verður at definera øki (og skelta) á smáu plássunum.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti sambært skjali 2005-2292/18.

Býarverkfrøðingurin kemur við tilmæli til fundin viðv. uppskotinum um endurskoðaðu reglugerðina um lastbilparkering smb. skjali 2005-2292/19.

**Tekniska nevnd 7. september 2006:** Nevndin tekur undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum at fara undir at gera p-pláss smb. skjali 2005-2292/18 og mælir fíggjarnevndini til at áseta p-gjald fyri parkeringina á økinum og at fíggja arbeiðið av íløgum fyri vegir.

Nevndin samtykti eisini at taka undir við nýggja uppskotinum um kunngerð - tó við teirri broyting, at §1 verður óbroytt í mun til galdandi kunngerð.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og játta kr. 800.000 av íløgum. Tó verður mælt frá at áseta p-gjald fyri tíðaravmarkaða almenna parkering.

Eisini samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við broytingunum í kunngerð um parkering í Tórshavnar kommunu.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**148/06** **2004-2277**

**Bygging av BIP til livandi djór á Eystaru bryggju í Tórshavn.**

Tað hevur leingi verið eitt ynski frá hestaeigarum í Føroyu, at kunna frakta ross beinleiðis úr Íslandi til Føroyar. Sum nú er, letur hetta seg ikki gera, og mugu hestarnir tí fyrst fraktast til Danmark fyri síðani at verða sendir aftur til Føroyar.

Hesin langi flutningur strongir rossini, og er á markinum til hvat ein kann loyva sær.

Í veterineravtaluni millum EU og Føroyar hava Føroyar ikki loyvi sjálvir at gera BIP-kontrol. Hetta merkir, at t.d. hestar úr Íslandi til Føroyar, skulu umvegis eina BIP-støð í EU (Danmark).

Tann 26. september 2005 skulu umboð fyri veterinerdeildina í vinnumálaráðnum hava fund við EU. Aftan á hendan fundin roknar veterinerdeildin við, at teir fáa eina ábending um, um EU í framtíðini vil loyva føroyingum sjálvum at gera BIP-kontrol.

Uppskot er gjørt um, hvussu BIP-støðin skal innrættast. Uppskotið er góðkent av teimum føroysku myndugleikunum. Uppskotið skal eisini góðkennast av FVO – ein stovnur undir EU kommisiónini. Ein slík góðkenning kann taka upp í 2 ár. Hóast FVO góðkennir projektið, kunnu teir altíð krevja broytingar seinni.

Í skrivi frá Føroya Ríðingarfelag og Føroyskt Íslandsrossafelag bjóðar teir seg til at gera støðina fyri Tórshavnar havn fyri kr. 160.000,00.

Ætlanin er at seta støðina á Eystaru bryggju, beint við vaskiplássið.

Um Tórshavnar havn stendur sum eigari av støðini, er møguligt at taka eitt brúkaragjald, soleiðis at verkætlanin hongur saman fíggjarliga.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til,

**at** Tórshavnar havn verður eigari av støðini.
**at** avtala verður gjørd við Føroya Ríðingarfelag og Føroyskt Íslandsrossafelag um at byggja støðina fyri kr. 160.000,00.
**at** hóskandi brúkaragjald verður ásett.
**at** arbeiðið at byggja BIP-støðina endaliga verður sett í verk, aftan á at Veterinerdeildin kemur við einari greiðari ábending um, at EU vil loyva føroyingum at gera BIP-kontrol.

**Havnarnevndin 29. august 2005:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Tað hevur verið sera trupult at fáa FVO at góðkenna tekningarnar til BIP-støðina, og hevur tað tí verið neyðugt at gjørt broytingar av støðini, sum nú er blivin góðkend, tó nakað størri enn upprunaliga ætlað.

Samlaði kostnaðurin fyri støðina er nú kr. 450.000,00.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til

**at** Tórshavnar havn verður eigari av støðini.
**at** játta kr. 450.000,00 til bygging.
**at** hóskandi brúkaragjald verður ásett.

**Havnanevndin 11. september 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at fíggja byggingina av íløgum hjá Tórshavnar havn fyri 2006, og at leggja málið fyri býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**149/06** **2006-2794**

**Keyp av arbeiðsbáti til víðlíkahald og upprudding.**

Tórshavnar havn hevur stóran tørv á einum arbeiðsbáti í tí dagliga rakstrinum.

Tað er alla tíðina eitt umvælingar- og viðlíkahalds arbeiði av teimum 600 bátaplássunum, har bummar og teymar javnan skulu kannast og umvælast. Hetta arbeiðið, sum í stóran mun verður gjørt frá landi, kundi verið gjørt munandi lættari frá einum báti.

Báturin er eisini ætlaður til dagliga upprudding á sjónum.

Tað er trupult at finna tann heilt rætta bátin til endamálið, tí hesin skal brúkast til ymisk endamál.

Vit hava kannað ymiskar møguleikar, og halda okkum fáa tann rætta bátin, ein brúktan Scania 28’, sum er tillagaður til okkara tørv, fyri í mesta lagi kr. 680.000,00.

**Tilmæli frá havnameistaranum:**
Mælt verður til at keypa ein 28' Scania, sum er tillagaður tørvinum hjá Tórshavnar havn, fyri í mesta lagi kr. 680.000,00, at fíggja av íløgum hjá Tórshavnar havn í 2007.

**Havnanevndin 11. september 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við havnanevndini.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**150/06** **2006-2606**

**Samstarvsavtala um Undirvísingarportal**

Kommunusamskipan Føroya, Føroya kommunufelag og Mentamálaráðið hava gjørt soljóðandi avtalu, treytað av, at kommunurnar taka undir við henni. Stýrið í KSF hevur tí avgjørt at leggja málið fyri limakommunurnar til støðutakan:

Henda avtala er gjørd millum Kommunusamskipan Føroya og Føroya Kommunufelag øðrumegin og Mentamálaráðið hinumegin.

**§ 1.** Stovnaður verður ein undirvísingarportalur undir leiðslu av Føroya Skúlabókagrunni, sum kommunurnar í kommunufelagsskapunum og Mentamálaráðið útvega fígging til.

*Stk. 2.* Føroya Skúlabókagrunnur hevur dagliga raksturin av portalinum um hendi og hevur ábyrgd av, at portalurin útvegar undirvísingartilfar og annað kunnandi tilfar.

*Stk. 3.* Portalurin skal vera atkomuligur hjá øllum, ið tann mun tað ber til orskað av upphavsrættindum o.a.

*Stk. 4.* Ein stýringarbólkur við 2 umboðum frá kommununum og einum umboði úr Mentamálaráðnum, ið er formaður, hevur ábyrgd av undirvísingarportalinum.

*Stk. 5.* Føroya Skúlabókagrunnur hevur ábyrgd av, at raksturin av portalinum ikki fer upp um játtanina og skal kunna stýringarbólkin um øll viðurskifti viðvíkjandi rakstrinum av portalinum.

*Stk. 6.* Føroya Skúlabókagrunnur skal gera sjálvstøðugan roknskap fyri portalin, ið ikki skal verða tengdur at fíggjarligu viðurskiftunum hjá Føroya Skúlabókagrunni annars.

**§ 2.** Undirvísingarportalurin verður stovnaður 15. september 2006 og heldur fyribils áfram til 15. september 2009.

*Stk. 2.* Í seinasta lagi 15. september 2006 gjalda kommunurnar tilsamans kr. 500.000 inn á serskilda kontu, sum verður stovnað til endamálið undir Føroya Skúlabókagrunni. Síðani skulu kommunufelagsskapirnir tilsamans gjalda soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. januar 2007 | kr. 500.000 |
| 1. januar 2008 | kr. 500.000 |
| 1. januar 2009 | kr. 500.000 |

*Stk. 3* Kommunufelagsskapirnir luta gjaldið sínámillum í sama lutfalli sum lutfallið millum samantalda fólkatalið í limakommununum 1. januar árið frammanundan.

*Stk. 4.* Mentamálaráðið skal útvega portalinum sín part av fíggingini soleiðis:

| | |
|---|---|
| 1. januar 2007 | kr. 1.000.000 |
| 1. januar 2008 | kr. 1.000.000 |
| 1. januar 2009 | kr. 1.000.000 |

**§ 3.** Í sambandi við stovnan av undirvísingarportalinum skal Føroya Skúlabókagrunnur gera eina nágreiniliga rakstrarætlan, eina lýsing av verkætlanini, seta mál, sum vísa, hvørji mál eiga at verða rokkin einstøku árini.

*Stk. 2.* Stýringarbólkurin skal góðkenna ásetingarnar í stk. 1.

**§ 4.** Samstarvspartarnir kunnu í semju gera neyðugar dagføringar í avtalutíðarskeiðnum.

**§ 5.** Skipanin og avtalan verða eftirmettar av stýringarbólkinum í samráð við Skúlabókagrunnin í august mánaði á hvørjum ári.

*Stk. 2.* Í januar mánaði 2009 verða skipanin og avtalan endaliga eftirmettar, um tær eiga at halda fram eftir sama leisti eftir 15. september 2009.

**§ 6**. Henda avtala kemur í gildi 15. september 2006, og er galdandi til 15. september 2009.

Stk. 2. Avtalan fellur tó burtur, um Mentamálaráðið ikki fær játtan á løgtingsfíggjarlógini til at fíggja sín part av avtaluni, sambært § 2, stk. 4.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka undir við avtaluni, og at peningur verður játtaður til endamálið.

**Mentamálanevndin 31. august 2006:** Samtykt at taka undir við tilmælinum hjá trivnaðarstjóranum og mentamálaleiðaranum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við avtaluni og at játta kr. 200.000 av reguleringskontoini í 2006.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**151/06** **2006-1321**

**Skriv frá Advokatskrivstovuni, dagfest 6. apríl 2006, viðv. matr. nr. 1om, Hoyvík.**

Biðið verður um loyvi at avhenda matr. nr. 1om, eigari p.f. J&K Petersen Contractors, til systurfelagið sp/f 31/01-1998.

Avhendingin verður framd vegna eina umskipan av feløgunum.

Nýtslan av økinum verður tann sama sum higartil, og upplýst verður, at sp/f 31/10-1998 ætlar at leiga ognina út til p.f. J&K Petersen Contractors.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at ganga umsóknini á møti.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**152/06** **2006-2196**

**Uppsøgn frá Maritu Skaale frá starvi sum tænastumaður.**

Uppsøgnin er galdandi frá 1. september 2006.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Tikið til eftirtektar at leggja fyri býráðið.

**Býráðið 21. september 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu at loysa Maritu Skaale úr starvi og at takka henni fyri langa og trúgva tænastu.

**153/06** **2006-0151**

**Umsókn um prinsipiella tilsøgn um keyp av byggilendi í Hoyvíkshaganum til størri handlar, skrivstovur, bústaðir hotel/kongresvirksemi, ítróttar-/heilsudepil v.m.**

**Lýsing av málinum - samandráttur.**
Við skrivi frá 10. januar 2006 hevur Annfinn V. Hansen, advokatur, vegna p/f Jákup á Dul søkt kommununa um prinsipiella tilsøgn um at fáa byggilendi í Hoyvíkshaganum til keyps.

Ætlanin er at nýta økið til verkætlanina ella heildarætlanina Stórutjørn, ið fevnir um handilsdepil, frítíðar- og ítróttadepil, skrivstovubygningar, hotell og íbúðabygging.

Í upprunaligu umsókníni varð søkt um lendi á uml. 300.000 m², men seinni er hetta víðkað til uml. 467.000 m².

Økið, ið verkætlanin Stóratjørn fevnir um, liggur partvís í A3-øki og partvís í D2-øki. Ein lítil partur liggur í 4. grundumráði. Tí er neyðugt við eini lítlari broyting í almennu byggisamtyktini.

Ásetingarnar fyri A3-økið loyva ikki eina slíka bygging, sum ætlanin er við Stórutjørn, uttan at hetta verður skipað í eini serstakari byggisamtykt.

Lendið talan er um, er almenn festijørð, ið sambært lóg verður fyrisitin av Búnaðarstovuni.

**Tilmæli:**
Kommunustjórin mælir til, at býráðið umvegis fíggjarnevndina góðkennir, at p/f Jákup á Dul fær prinsipiella tilsøgn um at keypa byggilendið til umrøddu verkætlan. Í prinsipptilsøgnini verða øll neyðug fyrivarni tikin eins og boðað verður generelt frá teim treytum, ið Tórshavnar kommuna m.a. fer at seta til søluna, byggingina o.a.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá kommunustjóranum.

**Býráðið 21. september 2006:** Framlagt.

Nú fór Elin Lindenskov

**154/06** **2006-2799**

**Millumverandi við Tórshavnar Havn**

**Innleiðing**
Leingi hevur verið tosað um at gera nakað við fíggjarliga millumverandi millum kommununa og havnina.

Tórshavnar havn hevur gjøgnum nógv ár fingið stuðul at menna og styrkja seg til sína førandi positión her á landi og sín kappaingarførleika móti okkara nærmastu grannalondum.

Úrslitið talar fyri seg, hóast stórar útbyggingar er framvegis trongt á havnaøkinum, har alt økið verður nýtt vinnuliga.

Peningaviðurskiftini hjá havnini hava líka síðani byrjan verið hildin atskilt frá kommununi. Hetta er heilt vanligt í okkara grannalondum, tí havnin er í einari serligari støðu, har hon eru eitt slag av fyritøku, sum hevur sínar egnu inntøkur.

**Stuðul**
Tórshavnar kommuna hevur seinastu árini stuðlað havnaútbyggingum við upphæddum, sum fyri 2006 er 4,9 mió. kr.

Tórshavnar havn skyldar í dag áleið 50 mió. kr. til Føroya Banka og Tryggingarfelagið Føroyar.

Tórshavnar kommuna kann enda stuðulin til Tórshavnar havn við at yvirtaka lánið frá Tryggingarfelagnum Føroyar uppá áleið 21 mió. kr.

**Skuld - millumrokning**
Við ársbyrjan skyldar Tórhavnar havn Tórshavnar kommunu áleið 131 mió. kr. Velur Tórshavnar kommuna at loysa seg úr árligu stuðulsveitingunum, við at yvirtaka lánið til Tryggingarfelagið Føroyar uppá áleið 21, mió. kr., kemur samlaða millumrokningin uppá áleið 152 mió. kr.

**Innskot - eginpeningur**
Nú útlit eru fyri nýggjari havnarakstrarlóg, kemur ein skuld til Tórshavnar kommunu uppá áleið 152 mió. kr. at virka tyngjandi.

Tórshavnar havn er ogn hjá Tórshavnar kommunu; at broyta millumverandi frá skuld til innskot vikar ikki ognarviðurskiftini. Hinvegin kemur ein konvertering at gera viðurskiftini greiðari rakstrarliga og fyri umheiminum.

**Tilmæli:**
Havnameistarin og kommunustjórin mæla býráðnum til

**at** steðga árligu stuðulsveitingunum frá 1. januar 2007 at rokna,

**at** kommunan beinanvegin yvirtekur restskuldina til Tryggingarfelagið, uppá áleið 21 mió. kr., og
**at** millumverandi millum Tórhavnar havn Tórshavnar kommunu verður broytt frá skuld til innskot.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum hjá havnameistaranum og kommunustjóranum.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

Nú kom Elin Lindenskov

**155/06** **<u>2006-0162</u>**

**<u>Fíggjarætlanin 2007 hjá Tórshavnar kommunu</u>.**

Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober senda býráðnuml uppskot til fíggjarætlan til komandi fíggjarætlan.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at leggja karmarnar uppá tkr. 530.000 fyri býráðið.

**Býráðið 21. september 2006:** Framlagt.

**156/06** **<u>2006-2731</u>**

**<u>Ferðslutrygdin við Hoyvíkar skúla</u>**

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Nevndarlimur hevur ynskt málið á skrá.
Umsitingin greiðir frá málinum.

**Tekniska nevnd 7. september 2006:** Nevndin samtykti, at umsitingin ger uppskot, sum tekur hædd fyri parkering og av- og ásetan við skúlan, at leggja fyri nevndina aftur skjótast gjørligt.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur á fundi 12. september 2006 við umboð fyri Hoyvíkar Skúla greitt frá ymsum uppskotum til loysn á ferðslutrupulleikanum kring skúlan.

Uppskotið, sum partarnir eru samdir í at arbeiða víðari við at leggja fyri til endaliga politiska støðutakan, tekur støði í,

at verandi inn- og útkoyring eystan fyri frítíðarskúlan verður liðugtgjørt, tað vil siga, at talið av p-plássum verður óboytt,

at av- og ásetingarplássið norðan fyri frítíðarskúlan eisini verður gjørt liðugt við smærri broytingum, og

at skúlagarðurin verður asfalteraður, samstundis sum frárenningarskipanin verður afturgjørd.

Umframt hetta uppskotið, vóru partarnir eisini samdir um at arbeiða víðari við fyriliggjandi uppskoti, sum tekniska nevndin á fundi í 8. desember 2005 samtykti við smærri broytingum.

Afturat hesum uppskotinum var eisini semja um at arbeiða víðari við uppskoti um p-plássið eystan fyri Hoyvíkshøllina.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 100.000,00 av íløgum fyri vegir 2007 til projektering v.m. at leggja fyri teknisku nevnd aftur til endaliga støðutakan.

**Fíggjarnevndin 13. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at játta kr. 100.000 av íløgum 2006.

**Ískoyti:**
Umsitingin fer saman við umboðum frá Hoyvíkar Skúla at greiða frá arbeiðssetninginum til ráðgeva. Tá ið projektið er klárt, verður tað framlagt fyri teknisku nevndini, áðrenn farið verður undir møguliga útbjóðing.

**Tekniska nevnd 19. september 2006:** Ein meiriluti, Marin Katrina Frýdal, Elin Lindenskov, Leivur Hansen og Sjúrður Olsen, samtykti, at umsitingin letur gera 2 uppskot (Uppskot 1 og 2, dagf. 13. sept. 2006) at leggja fyri nevndina aftur sum skjótast.

Ein minniluti; Høgni Mikkelsen, mælir til at taka undir við uppskoti nr. 2 og at fara undir arbeiðið beinanvegin.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt at taka undir við fíggjarnevndini 13. september 2006.

**157/06** **2006-2082**

**Val av føstum limi í barnaverndarnevndina hetta valskeiðið út.**

Beinta Nattestad, sum er fastur limur í barnaverndarnevndini, er flutt av landinum.

Gisleyg D. Bonde er tiltakslimur hennara.

**Býráðið 21. september 2006:** Vald varð Ann Elisabeth Joensen.

**158/06** **2005-0395**

**Val av limi í nevndina fyri vøggustovuna og barnagarðin á Konmansmýru hetta valskeiðið út.**

Beinta Nattestad, sum býráðið hevur valt í nevndina, er flutt av landinum.

**Býráðið 21. september 2006:** Vald varð Ann Elisabeth Joensen.

**159/06** **2006-2052**

**Val av bygginevnd til vardu íbúðirnar á Óðinshædd.**

**Býráðið 21. september 2006:** Vald vóru Elin Lindenskov og Beate L. Samuelsen.

Nú fór Jógvan Arge

**160/06** **2003-1519**

**Mál viðvíkjandi Hoyvíkshagi Suður - Sambindingarvegur til Klingruna**

***Viðv. leingjan av vegi 1:***
Í sambandi við útstykkingararbeiðið í Hoyvíkshaga Suður er kostnaðarmeting gjørd av at leingja veg 1 frá st. 285 til st. 370. (Vegur 1 er innkoyringarvegurin frá Løgmannabreyt). Mett verður at vegurin kann koma at nøkta atkomuviðurskiftini hjá einum komandi dagstovni á økinum.

Mett verður eisini, at tað er betur at fara undir leingingina av vegi 1, áðrenn fyrstu íbúgvarnir fara at seta búgv á økinum.

***Viðv. rundkoyring á vegamótinum veg1/veg2 við handilsøkið:***
Eins og í omanfyri nevnda máli er kostnaðarmeting gjørd fyri gerð av rundkoyring á vegamótinum, har eitt framtíðar handilsøki verður gjørt. Mett verður, at ein rundkoyring á hesum vegamóti fer at virka ferðtálmandi á økinum, og at væntandi verður, at nógv ferðsla fer um hetta vegamótið. Serliga skal havast í huga, at eitt komandi handils- og skúlaøki setir stór krøv til ferðslutryggleikan á einum vegastrekki sum hesum, ið liggur upp at einum íbúðarøki.

**Fíggjarlig viðurskifti**
***Viðv. leingjan av vegi 1:***
Sambært meting frá sp/f Verkfrøðingastovuni verður kostnaðurin fyri at leingja veg 1 mettur til uml. 1,2 mió. kr., og verður hetta grundað á sama einleikaprís, sum kostnaðarstøðið er í sáttmálanum við Samtakið Hoyvíkshagi Suður (SHS). Metingin er uttan projekt, eftirlit, mvg, vatn og gøtuljósveitingar og skelti. Asfalteringin er íroknað.

Samlaði kostnaðurin fyri hetta vegastrekkið verður mettur til 1,71 mió. kr.

***Viðv. rundkoyring á vegamótinum veg 1/veg2 við handilsøkið:***
Mett verður, at kostnaðurin fyri at gera rundkoyringina verður álj. kr. 410.000,00 sambært tilboði frá SHS. Tilboðið er uttan mvg, vatn og gøtuljósveitingar og skelti, men asfalteringin er íroknað.

Samlaði kostnaðurin fyri hetta vegastrekkið verður mettur til ½ mió. kr., tá er projekt og eftirlit tikið við.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til,

**at** biðja um tilboð frá SHS at leingja veg 1 við 85 m, st. 285 til st. 370
**at** fara undir arbeiðið beinanvegin at leingja veg 1, um tilboðið liggur innan fyri kostnaðarmetingina
**at** taka av tilboðnum frá SHS at gera rundkoyringina
**at** fara undir arbeiðið beinanvegin og at gera rundkoyringina

Eisini mæla tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin til at kostnaðurin kr. 1.710.000 + 500.000, ella kr. 2.210.000,00 íalt, verður játtaður burtur av teimum 4,0 mió. kr., sum er tann parturin av sølukostnaðinum fyri lendið til útstykkingina sambært j. nr. 200300343/2, avtala millum TK og Eigarafelagið.

**Tekniska nevnd 2. desember 2003:** Nevndin samtykti at beina málið í ferðslu-nevndina.

**Ferðslunevndin 26. januar 2004:** Ferðslunevndin mælir til, at gjørd verður rund-koyring á vegamótinum vegur 1, vegur 2.

Harumframt mælir politimyndugleikin til, at undirføring (viadukt) verður gjørd, so at fótgangarar og ferðsla verða sundurskild, serliga við atliti til handilsøkið og skúlaøkið.

**Tekniska nevnd 3. februar 2004:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá tekniska stjóranum og býarverkfrøðinginum.

**Fíggjarnevndin 17. februar 2004:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og at fíggja arbeiðið av konto 83 – keyp og søla av jørð.

**Ískoyti:**
Í skrivi, dagf. 29. mai 2004, frá Verkfrøðingastovuni (j. nr 200301519/17) er staðfest, at tilboðið frá byggisamtakinum SHS at leingja veg 01 er uml. 100.000,00 kr. hægri enn upprunaliga kostnaðarmetingin, tvs. 1,3 mió. kr. í staðin fyri 1,2 mió. kr.

Víst verður í hesum sambandi til skriv frá Tórshavnar kommunu, dagf. 5. februar 2004, (j. nr 200301519/13), har tekniska nevndin hin 3. februar 2004 samtykti at biðja um tilboð frá byggisamtakinum SHS um at leingja veg nr. 1 við 85 metrum frá st. 285 til st. 370, og at fara undir arbeiðið beinanvegin at leingja veg 1, um tilboðið lá innan fyri kostnaðarmetingina.

Sum grundgeving fyri muninum staðfestir Verkfrøðingastovan, at einleikaprísirnir í tilboðnum vóru lágir. SHS hava grundað tilboðið upp á leingjan av vegi 03 á dagsprís 7. mai 2004, meðan tilboðið upp á byggibúningina er grundað á einleikaprísir frá 13. januar 2003. Prís og lønarvøkstur í hesum tíðarbili er uml. kr. 18.000,00.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at játta kr. 100.000,00 afturat av konto 83 - keyp og søla av jørð, soleiðis at samlaða játtanin verður kr. 1.300.000,00 til alt arbeiðið at leingja veg 1 við 85 metrum frá st. 285 til st. 370 sambært tilboði dagf. 7. mai 2004 frá p/f SHS.

**Tekniska nevnd 22. juni 2004:** Vísandi til at kostnaðarstøðið at leingja veg 01 er munandi hægri enn upprunaliga metingin, samtykti nevndin ikki at taka av tilboðnum frá samtakinum, men at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitatión, at leggja fyri nevndina aftur tann 17. august 2004.

**Ískoyti:**
Orsakað av summarfrítíð fyriliggur einki boð upp á arbeiðið at leingja veg 01.

**Tekniska nevnd 24. august 2004:** Útsett til tilboð fyriliggur.

**Tekniska nevnd 4. mai 2006**: Nevndin samtykti at bjóða vegin (frá st. 287.00 til 372.63) út í innbodnari licitatión at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Verkfrøðingastovan hevur vegna kommununa í skrivi, dagfest 21. juni 2006, (j. nr. 2003-1519/25) heitt á 4 arbeiðstakarar um at bjóða uppá leingjan av Rólantsgøtu, og vórðu tilboðini latin upp 11. juli 2006, kl. $14^{00}$.

Tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| Sp/f R.J. Brockie | kr. 1.724.443,00 uttan mvg |
| Sp/f Andrias Berg | kr. 1.783.650,00 uttan mvg |
| Sp/f Plan | kr. 2.788.650,00 uttan mvg |
| Sp/f Maskinkoyring | Bar seg undan at bjóða |

Verkfrøðingingastovan hevur gjøgnumgingið tilboðini, og í skrivi, dagfest 17. juli 2006, (j. nr. 2003-1519/31) viðmælt at Sp/f R. J. Brockie fær litið í hendi at gera omanfyri nevnda arbeiði fyri kr. 1.724.443,00 uttan mvg.

Umsitingin hevur heitt á Verkfrøðingastovuna um at gera ein fíggjartørv í sambandi við leingjan av Rólantsgøtu.

Metingin til fíggjartørvin er í skjali 2003-1519/32, dagfest 17. juli 2006, og er áljóðandi kr. 2,25 mill. við 6,25 mvg.

Sambært fyriliggjandi tølum kemur hetta vegastrekkið at kosta kommununi kr. 26.470 pr. leypandi metur, og er hetta talið væl hægri enn ein meturprís upp á uml. 12-15.000 kr./m, sum hevur verið nýtt sum grundarlag í fyribilskostnaðarmetingum higartil. Tó skal viðmerkjast, at meturprísir til styttri vegir sum hesin eru væl dýrari, enn um vegirnir vóru longri.

**Tilmæli:**
Vísandi til at tað er neyðugt at útvega vegatkomu til framtíðar ansingarstovnin, mælir býarverkfrøðingurin til:

**at** taka undir við lægsta tilboði frá sp/f R.J. Brockie álj. kr. 1.724.443,00 uttan mvg

**at** játta kr. 2.250.000,00 sambært skjali 2003-1519/32, dagfest 17. juli 2006 av konto fyri íløgur fyri vegir
**at** beina málið í býráðið um fíggjarnevndina'

**Tekniska nevnd 19. september 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 21. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

**161/06** **2006-0848 (sí j. nr. 2005-2688)**

**Reinsan av Djúpagilsá og Hoydalsá, stig 3.**

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Í sambandi við reinsan av Hoydalsá, varð arbeiðsbólkur settur at kanna økið við tí fyri eyga at fáa Hoydalsá reina fyri kloakkvatn. Arbeiðsbólkurin kom tá til ta niðurstøðu at býta arbeiðið upp í 4 stig.

**Stigini eru hesi:**
Stig I Savnan av kloakkleiðingum við Hoydalsá oman fyri Vegin Langa
Stig II Savnan av kloakkleiðingum við Hoydalsá niðan fyri Vegin Langa
Stig III Savnan av veg og regnvatni oman fyri Vegin Langa
Stig IV Savnan av vegvatni frá Eystara Ringvegi

Umsitingin hevur saman við sp/f Martin E. Leo gjørt projekt við kostnaðarmeting fyri stig 3, ið er mett at hava størsta tørvin.

Kostnaðurin fyri hetta arbeiðið er mettur at verða kr. 7.458.178,00 íroknað projekt, eftirlit, ókendar útreiðslur v.m. Sí j. nr. 2006-0848/1.

Mælt verður til at arbeiðið verður boðið út í innbodnari lisitatión, og at hesir verða arbeiðstakarar bodnir við:

Sp/f Robert Brockie
Sp/f Andreas Berg
Sp/f Maskinkoyring v/ Karl Paturson
p/f Articon
p/f J & K Petersen, Contraktors

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til, at taka undir við fyriliggjandi uppskoti, stig nr. 3 og at heita á býráðið um fíggjarnevndina um at játta kr. 7,5 mió. og at bjóða arbeiðið út í innbodna lisitation at leggja fyri nevndina aftur.

**Tekniska nevnd 9. mars 2006:** Málið tikið av skrá**.**

**Ískoyti:**
Umsitingin saman við ráðgeva fara at greiða frá málinum. (Martin Leo og Torleif Dalsgaard koma kl. 17.00)

**Tilmæli:**
Víst verður til mannagongd í sambandi við verkætlanir, ið skulu fíggjast av konto fyri íløgur, har '*faknevnd vísir á tørv/hugskot og fígging*' til eina verkætlan. Býarverkfrøðingurin mælir til, at beina málið í *fíggjarnevndina at viðgera ávísing til fígging.*

**Tekniska nevnd 6. apríl 2006:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum hjá býarverkfrøðinginum til fundin 9. mars 2006 at taka av íløgum til kloakkir fyri 2006 og 2007.

**Fíggjarnevndin 18. apríl 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd og at játta kr. 4.000.000,00 av íløgum í 2006 og kr. 4.000.000,00 av íløgum í 2007.

**Býráðið 27. apríl 2006:** Samtykt uttan atkvøðugreiðslu.

**Ískoyti:**
Sp/f Martin E. Leo hevur vegna kommununa í skrivi, dagfest 28. august 2006, (j. nr. 2006-0848/9) heitt á 5 arbeiðstakarar um at bjóða uppá kloakkarbeiðið, og vórðu tilboðini latin upp 12. september 2006, kl. $11^{00}$.

Tilboðini vóru hesi:

| | |
|---|---|
| J & K Petersen Contractors P/F | kr. 9.663.275,00 uttan mvg |
| Sp/f Andrias Berg | kr. 8.121.440,00 uttan mvg |
| Sp/f R.J. Brockie | kr. 7.468.890, 95 uttan mvg |
| Sp/f Maskinkoyring | Bar seg undan at bjóða |
| P/F Articon | Bar seg undan at bjóða |

Sp/f Martin E. Leo hevur gjøgnumgingið tilboðini og í skrivi, dagfest 16. september 2006, (j. nr. 2006-0848/10) viðmælt, at sp/f R. J. Brockie fær litið í hendi at gera omanfyri nevnda arbeiði fyri kr. 7.468.890,95 uttan mvg.

Umsitingin hevur heitt á sp/f Martin E. Leo um at gera ein fíggjartørv í sambandi við arbeiðið.

Metingin til fíggjartørvin er í skjali 2006-0848/10, dagfest 16. september 2006, og er áljóðandi kr. 8.947.285,00. við 6,25 mvg.

Vísandi til framløguna frá kloakkevnisdøgunum 26. janaur 2006 er umsitingin komin fram til eina meting áljóðandi kr. 8,1 mill., harumframt eru 10% til ókendar útreiðslur.

**Tilmæli:**
Býarverkfrøðingurin mælir til at tikið verður við tilmælinum frá sp/f Martin E. Leo.

**Tekniska nevnd 19. september 2006:** Nevndin samtykti at taka av lægsta tilboði frá sp/f R. J. Brockie, álj. kr. 7.468.890,95, og at heita á býráðið um fíggjarnevndina at játta kr. 8.947.285 av íløgum fyri kloakkir í 2006 og 2007.

**Fíggjarnevndin 21. september 2006:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðið 21. september 2006:** Einmælt samtykt.

Nú kom Jógvan Arge

**FUNDUR LOKIN KL. 19:40**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Jógvan Arge | Leivur Hansen | Hildur Eyðunsdóttir |
| Marin Katrina Frýdal | Katrin Dahl Jakobsen | Elin Lindenskov |
| Annika Olsen | Bjarti Mohr | Beate L. Samuelsen |
| Sjúrður Olsen | Høgni Mikkelsen | Inga Dahl |
| | Heðin Mortensen | |